


***Nr. 9*** ***25. apríl 2021*** ***81. árg.***

# Frelsan er frí

*„Hoyrið! Komið higar øll, ið tysta, og fáið vatn, komið hvør, sum einki silvur eigur, keypið korn og etið fyri einki, keypið vín og mjólk fyri einki.“ Jes. 55,1.*

Soleiðis rópti Jesaja til Ísrael fyri at sannføra tey um, at frelsan var frí. Hon er frí fyri øll, eins frí nú sum á døgum gamla Ísraels. Og kortini, sum tað eru frá, sum trúgva tí, sum tey eru fá, sum taka ímóti Guds gávu! Sum tey eru fá, sjálvt millum børn hansara, millum eftirfylgjarar hansara, sum taka ímóti øllum, sum Gud hevur at bjóða! Hann gevur okkum ikki bert angur og fyrigeving, men frið og gleði og trúgv, sum vil fría okkum frá allari gremjing, ótta og óvissu. Hann vil fylla okkum við Heilaga Andans fylling, um bert vit loyva tí. Staðin fyri stríðast vit fyri at gera okkum verdug til hana ella lata bara sum einki.

Einaferð, tá ið dýrtíð var í London fyri mongum árum síðani, gekk ein sølumaður runt í gøtunum í tí fátæka partinum av býnum og rópti: „Sildir! Tríggjar fyri ein penny (8 oyru),“ men eingin keypti so mikið sum eina sild, tí eingin átti so frægt sum ein penny.

Ein blídligur maður, sum kom framvið, keypti allar sildirnar og segði við sølumannin, at nú skuldi hann aftur fara oman eftir gøtuni og rópa: „Ókeypis sildir! Fínar, góðar royktar sildir fyri einki!“

Tað gjørdi hann, men fólk trúðu honum ikki. Hann sá eina konu sita í vindeyganum og segði: „Gerið so væl, tygum, sildir fyri einki, eitt framúrskarandi høvi hjá tygum, komið og fáið tygum.“

Konan risti vantrúgvin við høvdinum. „Á, tann tápulingur,“ mutlaði sølumaðurin. „Men soleiðis fara ikki øll at bera seg at.“

Men tað gjørdu tey kortini, og hann fór aftur til hin fremmanda mannin uttan at hava givið eina einastu sild til nakran.

„Latið okkum báðar royna saman,“ segði maðurin. So róptu báðir: „Sildir fyri einki! Er nakar, sum vil hava sildir ókeypis?“

Fólk vóru bilsin av at síggja ein fínan harra í teirra gøtu; men tey fingu seg ikki at trúgva, at tey fingu sildir ókeypis. At enda komu maðurin og seljarin til ein flokk av smádreingjum, sum vóru kryplingar, kloddutir og svangir. Teir hoyrdu rópið: „Sildir fyri einki,“ og teir trúðu tí. Teirra ágrýtnu framraktu hendur blivu fyltar við sildum, til hin seinasta var farin.

Nú savnaðust tey, sum høvdu ivast, rundan um teir og bóðu um sild; men ov seint var. Millum tey vónsviknu var hin konan, sum hevði sitið við vindeygað. Hon segði: „Eg trúði ikki, at tit meintu hetta í álvara.“

„Nú mást tú sita svong fyri tína vantrúgv,“ segði sølumaðurin. Frelsan kostaði Himlinum nógv, ja, lívið hjá Guds soni. Hann rindaði av fríum vilja og við gleði kostnaðin. Í umleið seks túsund ár hevur Gud sent sítt orð við sínum boðberum og bjóðað fyrigeving fyri einki, frið fyri einki, frelsu fyri einki! Ein dag fer tilboðið at verða tikið aftur. Men í dag kunnu vit koma og fáa hetta uttan pengar og uttan at rinda nakað.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hevur tú hugsað um

*at Guds orð* sigur: „Hugsa um skapara tín í ungdóms døgum tínum, áðrenn teir vondu dagarnir koma, og tey árini nærkast, sum tú sigur um: „Tey huga mær ikki.“?

*at betri* er at ganga á odda og vísa eina góða fyrimynd enn at ganga aftaná og finnast at?

*at sjálvt* hin longsta ferðin byrjar við einum fótafeti, og at vit tí ongantíð skulu gerast bangin fyri at byrja í smáum?

*at tíðin* er so stutt samanborið við ævinleikans endaloysi?

*at ein synd* dregur eina aðra við sær?

*at Jesus* kom til jarðar at leita eftir tí, sum glatað var og at frelsa tað?

*Effie Campbell* umsetti.

# So gjølla fylgir Hann við

*Ein maður vitnaði á missiónsvikuni uppi í Meinigheitshúsinum:*

Eg skuldi fara eini ørindi til Danmarkar. Eg gjørdi av, at eg samstundis skuldi fara at vitja eina familju hjá mær og gista har í tveir dagar. Hesi fólkini áttu vaksin børn; men eingin har í húsinum var trúgvandi, tí tey vóru als ikki vaksin upp í tí.

Eg fekk eina øgiliga neyð fyri einari av døtrunum í húsinum. Tá ið eg var farin til songar um kvøldið, legði eg meg at biðja: „Góði Jesus, lat hasa gentuna vera uppi í morgin ári, og lat hana sita inni í stovuni á tí og tí stólinum."

Soleiðis bað eg, og eg skal siga tær, at Harrin fylgir ógvuliga nágreiniliga við. Tá ið eg kom upp morgunin eftir og fór inn í stovuna, sat henda gentan júst í tí stólinum, sum eg hevði biðið um.

Eg fór yvir til hennara og segði: „Kann eg sleppa at biðja fyri tær?"

Hon fór at gráta. So segði hon: „Eg havi biðið nú í morgun fyri fyrstu ferð í mínum lívi. Eg bað: „Tú, Jesus hjá hasum føroyinginum, hjálp mær. Lat føroyingin spyrja, um hann kann biðja fyri mær."

Hatta er Gud! So gjølla fylgir hann við. Eg bað fyri henni og spurdi so, um hon vildi blíva frelst. Jú, tað vildi hon fegin. So bóðu vit frelsubønina saman, og hon bleiv herliga frelst.

*Effie Campbell.*

# Tú ert skrivaður inn í Guds testamenti

*„... geva tykkum arvalut saman við øllum teimum, sum halgað eru." Áps. 20,32.*

Linda Knox var í áttatiárunum, tá ið hon doyði í hungri í íbúð sínari í Chicago. Tað var skilligt, at hon var heilavill, og hon sá illa. Hon legði eftir seg, tað sum svarar til 1.000.000 krónur í óinnloystum kekkum. 1.500.000 krónur í listaverkum, meir enn 3.000.000 krónur í smúkkum og umleið 300.000 í forngripum. Til samans legði hon eftir seg eitt búgv, sum var meira

vert enn 5 milliónir – og kortini doyði hon einsamøll í fátækradømi. Tað, sum verri var, var, at hon hevði skrivað eitt uppskot til eitt testamenti, har hon læt alt til vinir og familju, men hon hevði ongantíð gjørt tað løgfrøðiliga galdandi, og tí gjørdist tað heldur ongantíð galdandi. Slektin og vinirnir vistu einki um teirra arv.

Tá ið Kristus doyði og fór aftur til Himmals, læt hann eitt testamenti eftir seg. Og í tað testamentið ert tú skrivaður í. So kanst tú spyrja: „Hvar finni eg eitt kopi av tí?" Í orði Hansara! Tú ert Guds arvingur og Krists samarvingur. (Sí Róm. 8,17). Tá ið hesin sannleikin finnur veg til títt sinni, fer tín hugburður til bíbliulestur at kollveltast. So fert tú – staðin fyri at brúka høpisleysar tímar at hyggja í sjónvarpið ella at vera á internetinum – at grunda á Skriftina „dag og nátt"; og „... alt, ið tú gert, skal eydnast tær." (Jós. 1,8 og Sálm. 1,2–3).

So skilir tú betri, hví Dávid segði: „Gleðast eg vil um boðorð tíni, sum eg eri góður við ... Lógin av munni tínum er mær betri enn gull og silvur í túsundtali." Sálm. 119,47 og 72. Pætur skrivaði: „Alt tað, sum hoyrir til lívs og Guds ótta við kunnugleikanum um hann, sum kallaði okkum við síni egnu dýrd og kraft, og við teimum hevur givið okkum tey størstu og dýrastu lyfti, fyri at tit við teimum skulu verða felagar í guddómligari náttúru." 2. Pæt. 1,3–4.

Hvat meir kanst tú ynskja tær?

*„... et Ord til Dagen"*
*Effie Campbell* umsetti.

---

**Steen Moseeg:** Tá ið mamma doyði í fjør, gjørdu vit av, at vit skuldu brúka arvin eftir hana at byggja eina kirkju í Afrika – í tí økinum, sum mamma hevði stuðlað í mong Harrans ár. Vit hugsaðu, at ein nýggjan bil fært tú ikki við tær til Himmals, men tú fært tey við tær, sum tú vinnur fyri Himmalin.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25. apríl | Tekstur: Rut, 1,1-5+16; 2,11-12 ;4,9 | bíbliuorð: | Jes. 49,15d-16a |
| 2. mai | Tekstur: 1 Sám. 1,9- 20; 2,1-2 | bíbliuorð: | 1 Sám. 2,3c |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




***Nr. 10 9. mai 2021 81. árg.***

# Roknað til rættvísi

*„Tí varð tað eisini roknað honum til rættvísi.“ Róm. 4,22.*

Fyri at skilja orðingina „roknað til“ skalt tú hugsa um peningaognir, sum verða fluttar frá einari kontu til eina aðra. Bankarnir gera hetta hvønn einasta dag. Hugsa tær, at tín støða er heilt vónleys, og tú ikki ert førur fyri at rinda tína skuld. So kemur eitt ótrúliga náðiríkt menniskja og tekur sær av allari tínari skuld – og harafturat flytur hann inn á tína kontu eina so stóra peningaupphædd, at tær ongantíð aftur nýtist at arbeiða. Tað er tað, sum hendi á krossinum, tá ið Gud legði allar okkara syndir yvir á „kontuna“ hjá Kristusi og tilroknar okkum Hansara rættvísi. Tað er so framúrskarandi!

Hevði tú sagt: „Eg kann ikki lata teg gjalda alla hesa skuldina, so eg skal arbeiða fyri at gera meg verdan til tína náði?“ Tað er av sonnum tað, vit siga, tá ið vit skoyta okkara góðu gerðir upp í Kristusar fullgjørda verk.

Frelsan er sum ein vørulýsing upp á heilsukost: Eingi kunstig (mannagjørd) evni blandað uppí.

Paulus skrivar: „Tann, sum ikki visti um synd, gjørdi hann til synd okkara vegna, fyri at vit skulu verða Guds rættvísi í honum.“ 2. Kor. 5,21. Á sama hátt sum Gud „gjørdi“ Hann (Jesus), sum ikki kendi til synd, til synd, „gjørdi“ Hann teg, sum ongantíð sjálvur kundi blíva nóg rættvísur, rættvísur í Hansara eygum.

„Men eg kenni meg so sekan, tá ið eg syndi!“ Tað er eisini meiningin!

Men tá ið Kristus tók alla tína synd, tók Hann eisini alla tína skuld. Hvussu kennir tú tað so í dag? Eitt innara stríð! Tín endurføddi andi sigur tær, at tú ikki longur kanst liva við synd; tað er ikki longur tað menniskja, tú ert!

Hví gjørdi Gud tað upp á henda mátan?

Tí at eitt og hvørt rættvísi, vit sjálv kundu rokkið, liggur ógvuliga langt frá tí, Hann krevur. Gleð teg – í dag sær Gud teg klæddan í Kristi rættvísi, og tí ert tú altíð elskaður og góðtikin.

*„... et Ord til Dagen“*
*Effie Campbell* umsetti.

# Lat aldurin tala!

*„Eg hugsaði: „Lat aldurin tala!“ Job 32,7.*
*„Harri, lat tað standa enn hetta árið, til eg fái grivið uttan um tað og taðað tað.“ Luk. 13,8.*

Tá ið ár tíni tala, hvat hoyrir tú tá? Hvat hoyrir Gud? Hvat hoyra tíni medmenniskju um teg? Endin á hesari taluni verður neyvan nakar annar enn hesin: Vend um! Allir tínir dagar rópa til tín: Vend við!

Urtagarðsmaðurin kemur í dag í urtagarð sín og spyr eftir frukt. Hvat svara dagar tínir, tá ið hann stillar seg framman fyri teir og spyr? Hvat sigur seinasta árið um teg? Finnur hann ta frukt, hann ynskir sær? Nógva náði hevur hann brúkt upp á teg. Hann hevur givið tær nógv, og tann, sum hevur fingið nógv, frá honum skal mikið krevjast. Tá ið nú Faðirin sigur: Í so mong ár eri eg komin, og ongantíð havi eg funnið frukt á hesum trænum. Høgg tað niður! – Hvat vilt tú tá gera? Hugsa tær, at henda avgerðin varð tikin í himli í dag! Var tað ikki gjørligt? Hevði tú ikki uppiborið tað. EG hevði ið hvussu var. Hvat skuldu vit so gjørt?

Vit skuldu uttan at drála farið til Jesusar av heilum hjarta og biðið hann stigið fram fyri okkum. Hann er okkara einasti millumgongumaður og sáttarmaður. Vit skulu kasta okkum niður fyri hann og biðja hann fara í forbøn fyri okkum. Tá biður hann til Faðirin fyri okkum og sigur: Lat hann standa eisini hetta árið! Eg skal grava rundan um hann og breiða tøð á. Kanska ber hann frukt tá? Um ikki, so kanst tú høgga hann niður.

Hygg, soleiðis er tað. Tú hevur bara Jesu forbøn at takka fyri, at Gud hevur givið tær so mong ár. Men kanska verður komandi ár tað seinasta. Brúka tað tí! Halt teg til tín Gud og Frelsara, so at hann onga orsøk fær at siga: Høgg tað niður! Hví skal hann taka plássið til onga nyttu? Gud er ógvuliga tolin. Tað síggja vit av søguni um Nóa. Gud dvøldi leingi og gav menniskjunum eina freist. Men jú longri hann dvøldi, tess størri gjørdist óndskapur teirra. Umsíðir læt hann dómin koma.

Sami Gud livir enn. Skalt tú ikki enda árið við teirri bøn, at Gud ikki má harta teg? Mátti hann við Jesusi endurnýggja hjarta títt til sanna umvending og givið tær eitt lív eftir sínum góðtokka.

*Gossners Skattkiste* - *Effie Campbell* umsetti.

# Hvagar fara tínar bønir?

*„Systrarnar sendu tá boð til hansara og lótu siga við hann: „Harri, sí, tann sum tú elskar, er sjúkur." Jóh. 11,3.*

Onkur varð sendur til Jesusar vegna Lázarus, og tey fingu svar frá Jesusi. Grøðingin fór tó ikki fram fyrr enn nakrar dagar seinni; men klokkan varð sett í gongd, tá ið áheitanin kom.

Hevur tú hugsað um, hvagar ið tínar bønir fara, tá ið tær eru farnar av tínum vørrum? Hoyr: „Og tá ... varð tøgn á himni ... Og annar eingil kom og fór at standa við altarið ... og honum varð fingið nógv roykilsi, fyri at hann skuldi leggja tað afturat bønunum frá øllum hinum heilagu á gullaltarið framman fyri hásætinum. Og roykurin av roykilsinum steig upp við bønunum frá hinum heilagu úr hond eingilsins fyri ásjón Guds." Opb. 8,1–4.

Hví gjørdist tøgn á himni? Av tí at onkur bað! Himmalin steðgar á fyri at lurta eftir bønum tínum. Bønirnar stíga upp sum roykilsi til Guds. Orð tíni steðga ikki, fyrr enn tey náa Guds hjarta.

Men gev tær far um, at tann vinurin, sum fór til Jesusar vegna Lázarus, segði: „Harri, tann, sum tú elskar, er sjúkur." Bøn hansara var grundað á Frelsarans fullkomna kærleika – ikki hin ófullkomna mannakærleikan. Hann segði ikki: „Tann, sum elskar teg, er sjúkur." Hann segði: „Tann, TÚ elskar, er sjúkur." Tað er stórur munur á har!

Megin í bønini verður ikki grundað á evnini hjá tí, sum biður, men á óbroytandi kærleika Jesusar. Ert tú ikki glaður fyri tað? Tú hevur kanska gjørt mong mistøk. Tú skilir kanska ikki loyndarmálið við bønini, men eitt er vist: Tað hendir okkurt í Himli, tá ið onkur á jørð biður.

*„... et Ord til Dagen“*
*Effie Campbell* umsetti.

# Verðið takksom

*„… verðið **takksamir!**“ Kol. 3,15.*
*„Latum tí okkum … vera **takksamar** og við tað tæna Gudi.“ Hebr. 12,28.*
*„Fyrst av øllum áminni eg tá um, at tað verða hildnar **takkargerðir** fyri øllum menniskjum.“ 1. Tim. 2,1.*

Um tú hyggur í ymsar bíbliukommentarar, so sært tú navnið Matthew Henry. Hann livdi frá 1662 – 1714. Hann var altíð so takksamur. Hann skrivaði hvønn dag dagbók. So var tað eitt kvøldið eftir eitt møti, at hann bleiv álopin, feldur til jarðar og rændur.

Tá hugsaðu tey: „Hvat man hann skriva í dagbók sína í kvøld?“ Har hevði hann skrivað fýra setningar:

**1.** Takk Gud, at eg ongantíð eri vorðin rændur fyrr.

**2.** Takk Gud, at sjálvt um teir tóku alt, sum eg hevði, so tóku teir ikki lív mítt.

**3.** Takk Gud, at sjálvt um teir tóku alt, sum eg hevði, so var tað ikki so nógv, sum eg hevði.

**4.** Takk Gud, at tað var eg sjálvur, sum varð rændur, og at tað ikki var eg, sum var rænarin.

Tú sært, at tú kanst leggja eina tøkk inn í alt, um tú tekur ta avgerð at hava eitt takksamt hjarta. Gloym ikki at fylla títt bønarlív við tøkk.

*Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 9. mai | Tekstur: 1 Sám. 3,1-18 | bíbliuorð: 1 Sám. 3,10b |
| 16. mai | Tekstur: Matt. 28,16-20 | bíbliuorð: Matt. 28,20b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74